

*Stuðulin til Walesa var treytaleysur, tá Solidaritet í 1981 varð bannað av pólversku stjórnini. Myndin er tikin, meðan bíðað verður eftir avgerðini hjá dómsvaldinum um kravda bannið*

**MYND:** POLFOTO

einsamallir áttu heiðurin fyri, at kalda kríggið nærkaðist endanum, er kanska at taka munnin ov fullan. Men at teir áttu sín velduga leiklut í hesum, er eingin sum helst ivi um. Leiklutir, sum altjóða samfelagið eisini hevur heiðrað teimum fyri við hvør sínari Nobel-virðisløn.

Tí fyrst og fremst vísti hetta veikleikar, sum eingin kendi til í eysturblokkinum. Russiski leiðarin, Leonid Brezjnev fanst hvassliga at pólversku kammeratum sínum, og eisini KGB-ovastin, Jurij Andropov, ávaraði um ávirkanina, sum hetta kundi hava á russiskar frælsistríðsmenn.

Men í Kreml vóru leiðararnir bæði møddir og bangnir. Carter-stjórnin í USA hevði reagerað ógvusligt, tá sovjettiskir hermenn fóru inn í Afghanistan, men tað var fyri einki at rokna móti tí, sum kundi væntast frá Reagan, um herlið eisini vórðu send til Póllands.

Drúgva kríggið í Afghanistan – og kommunistiskur stuðul aðrastaðni við – hevði mergsogið búskapin. Og tí vildi ein møgulig handilsblokada havt vanlukkuligar fíggjarligar avleiðingar.

Og hartil var uppreisturin hjá Walesa øðrvísi enn tann í Prag á vári í 1968. Ta ferðina var tað politiski myndugleikin, sum gjørdi uppreistur móti Moskva. Hesaferð var tað arbeiðarafjøldin, ið gjørdi uppreistur



*Tilvitað ella ikki, so hevði tað ovurstóra ávirkan á heimspolitikkin, tá Karel Wojtyla varð valdur til páva í 1978. Fyri fyrstu ferð kom katólski ovastin úr einum kommunistalandi, og við sjónleikaraevnum sínum og treytaleysa boðskapinum um næstrakærleika megnaði hann við trúnni at flyta meira, enn vesturlendskir leiðarar høvdu roynt í tvey áratíggju*

**MYND:** POLFOTO

móti sjálvari skipanini. Og hóast hvøssu atfinningarnar frá Moskva, so vildi russiska stjórnin ikki geva herinum boð um at skjóta móti sínum egna fólki.

Í desember mánaði 1981 stóð greitt, at sonevnda Brezjnev-doktrinin var deyð. Ein politikkur, sum hevði til endamáls at skapa kommunistiska ávirkan um allan heim. Sambært Andropov kundi Russland ikki gera nakað, hóast Solidaritet skuldi fáa valdið í Póllandi. Snøgt sagt, tí tað hevði størri týdning at savna seg um tað, sum hendi í Moskva. Tað var tó ikki fyrr enn seinni – tá skjalagoymslurnar gjørdust alment atkomuligar, at hendan greiningin sá dagsins ljós. Hevði hon gjørt tað í 1981, er ikki víst, at tað skuldi taka átta ár afturat, áðrenn múrurin fall. Proletararnir, sum kommunisman skuldi verja, høvdu sjálvir fordømt somu kommunismu, uttan at valdið tordi at gera nakað við tað.

Ístaðin eydnaðist tað russiku leiðarunum at sannføra pólverja um, at russiski herurin var um reppið at leggja upp í politisku støðuna í Póllandi. Og so gjørdi stjørnanin hjá Wojciecj Jaruzelski av at lýsa undantaksstøðu, banna Solidaritet og senda Walesa í fongsul. Men ikki uttan tey væl kendu orðini: »Hetta er seinasti seymurin í kommunistisku líkkistuni«.

Og seymurin gjørdist av tí sjeytumma langa slagnum í 1989. Jarntjaldið var um at rapa, og búskapurin var í sorið, tá Jaruzelski gjørdi av at loyva einum demokratiskum vali, har flokkurin hjá nú leyslætna Walesa fekk loyvi at stilla upp.

Walesa tók av, hóast hann ikki ivaðist í, at valsvik fór at verða framt, men hann fekk annað at síggja. Við einum einstøkum undantaki vann Solidaritet allar sessir, sum stillað varð upp til í bæði undir- og yvirhúsinum. Walesa sjálvur var púrasta skelkaður og segði skemtandi, at hann nú hevði heystað meira, enn hann hevði rúm fyri í korngoymsluni. Í Moskva segði nýggi russiski leiðarin, Michael Gorbatjov, at stjórnaskipanin í Póllandi var nakað, sum pólverjar sjálvir máttu syrgja fyri, og tann 24. august í 1989 tók so fyrsta ikki-kommunistiska stjórnin í eysturblokkinum við. Eitt stjórnarskiftið, ið var somikið skelkandi, at nýggi forsetin, Tadeusz Mozowicki, svímaði, tá hann skuldi takast í eið.